# Favorittarnir fella á Mølini



*Annað árið á rað kiksaði oddaliðið á Mølini á Eiði. Hesa ferð var tað HB, sum púra óvæntað - men uppiborið - mátti fara stigaleyst heimaftur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Spenningurin í toppinum er øktur, eftir at oddaliðið annað árið á rað var fyri óvæntaðum stigamissi á útivølli ímóti EB/Streymi**

8. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Landskappingin er meiri spennandi eftir áttanda umfarið, enn hon hevur verið higartil í ár. HB og NSÍ skulu ólavsøkudag spæla steypafinalu. Hesi bæði liðini eru eisini oddalið í landskappingini. Men nú er tættari millum tey, enn tað var undan vikuskiftinum. Tá høvdu bæði liðini seytjan stig, men NSÍ hevði spælt ein dyst meiri enn HB. Nú hava bæði liðini seytjan stig, og tey hava bæði spælt átta dystir. Púra óvæntað megnaði HB ikki at fáa stig við til hús, tá teir leygdarkvøldið vóru á Eiði, har heimaliðið vann 2–1.

At oddaliðið kiksar á Mølini minnir um kappingarárið í fjør. GÍ hevði vunnið allar dystirnar, tá teir í ellinda umfarinum, sum var tað fyrsta eftir summarsteðgin, vóru á Eiði. GÍ var stórfavorittur, men úrslitið varð 1–1. Eftir meiri enn hálvkiksarin royndist tað illa hjá GÍ, sum í seinastu sjey umførunum tapti tvær ferðir og spældi tvær ferðir javnleik. Og so vann B36 FM heitið.

Spurningurin er so, hvussu gongdin hjá HB fer at verða, eftir at teir hava tapt fyri fyrstu ferð. Undan summarsteðginum eiga teir tveir dystir í Gundadali. Úrslitini siga, at HB trívst væl betri á heimavølli, enn teir trívast á útivølli. Higartil hava teir spælt fýra ferðir uttanfyri Havnina, og teir hava bara vunnið á Skála. Á Toftum og í Vági fingu teir javnleik við til hús, og nú leygardagin taptu teir fyri fyrstu ferð í ár – á Mølini á Eiði.

Tá HB avrikini eftir øllum at døma eru so nógv øðrvísi í Gundadali, enn tey eru aðra staðni, kemur tað sjálvandi væl við hjá teimum, at teir eiga so at siga ein eyka heimadyst ímóti B36. Men eftir summarsteðgin skal HB til Klaksvíkar, Gøtu, Runavíkar og í síðsta umfarinum suður á Sevmýri.

## Fingu uttan at spæla

Samskiftið gongur skjótt nú á døgum. B68 liðið hevði ikki meiri enn lagt rygg til stórtap suðuri í Sveis, tá teir høvdu fingið boðini um, at HB hevði tapt. Harvið styrkti B68 – uttan at spæla – sammett við oddaliðið higartil sína støðu á triðja plássinum. Og so verður tað uppaftur meiri spennandi, tá toftamenn um tvær vikur og í síðsta umfarinum undan summarsteðginum skulu spæla ímóti HB í Gundadali.

NSÍ hevði eisini frí í vikuskiftinum, og teir kundu fegnast um, at úrslitini lagaðu seg rættuliga til teirra fyrimun. HB tapið hevur við sær, at tað er púra javnt millum HB og NSÍ. Og B36 tapið í Gundadali og KÍ javnleikurin á heimavølli hava við sær, at NSÍ – uttan at spæla – bæði styrkti um sína støðu í avgjørdu oddakappingini, og at teir løgdu meiri sjógv millum seg og – burtursæð frá B68 – feløgini, sum so fegin vilja vera við í stríðnum um gullmerkini.

## Uppsangur hjálpti

B36 kundi havt lagt seg bara eitt stig aftanfyri tey bæði oddaliðini. Men tað gongur einki serligt í Gundadali hjá meistaraliðnum. Tapið ímóti GÍ var tað triðja á heimavølli í ár. Umframt ímóti GÍ hevur B36 tapt í Gundadali ímóti báðum oddaliðunum – HB og NSÍ. Sunnudagin skal B36 spæla jóansøkudyst í Vági. Har plagar tað at vera torført hjá teimum flestu, men B36 hevur illa ráð at missa stig.

Umframt B36 kendi KÍ ikki sína vitjunartíð. Við seinastu umførunum í huga kann ikki annað sigast, enn at málleysi javnleikurin ímóti VB var vónbrot hjá heimaliðnum. KÍ hevði vunnið tríggjar ferðir upp í slag, og VB hevði ikki vunnið tríggjar ferðir upp í slag. Klaksvíkingar vilja fegnir vera við, har tað gongur fyri seg. Um teir skulu megna tað, so ber ikki til at missa ov nógv á heimavølli. Higartil í ár hevur KÍ í fýra heimadystum mist trý stig ímóti B36 og tvey ímóti VB. Tað er ov mikið.

Stigatapið ímóti VB hevur við sær, at tað er trýst á KÍ, tá teir komandi sunnudag fara til Runavíkar. Um NSÍ megnar at fáa fult, so er fjarstøðan hjá KÍ til toppin sjey stig. Annars hevur kappingarárið hjá KÍ higartil verið sera átókt tí í fjør. Tá taptu teir á heimavølli í tveimum teimum fyrstu umførunum. So vunnu teir tríggjar ferðir upp í slag, áðrenn EB/Streymur á norðoyarstevnu punkteraði kappingarárið hjá KÍ. Eftir trilvandi byrjan í ár, tóktist KÍ hava fingið tak á stigaheystinum, men nú meiri enn hálv kiksaðu teir.

Við avrikinum ella heldur manglandi avrikinum hjá GÍ ímóti KÍ næstsíðsta sunnudag í huga mundu tey vera fá, sum høvdu roknað við, at GÍ skuldi fáa fult í Gundadali. Men tað gjørdu teir, og tað var stórur munur á hugburði og vilja frá sunnudegnum frammanundan. Mikukvøldið var fundur í Gøtu, har luftin varð reinsað, og um útluftingin fer at síggjast aftur í meiri enn hesum eina dystinum, so verður GÍ við í telvingini um fremstu plássini.

## Skála framvegis ongan sigur

Við sigrinum á HB tók EB/Streymur seg frá hinum botnliðunum. At vinna 2–1 á HB var meiri enn stórt plástur á opna sárið, sum EB/Streymur hevði, tá teir næstsíðsta sunnudag fóru úr Gundadali við 7–2 tapi fyri B36 í viðførinum. Einki er at ivast í, at onnur lið enn HB fara at verða snýtt ímóti EB/Streymi, sum í løtuni tykist hava góðar møguleikar at varðveita plássið í bestu deildini.

VB javnleikurin í Klaksvík lyfti FM vinnararnar í 2000 eitt sindur frá botninum. Eftir turbolentu síðstu vikuna, tá jugoslaviski venjarin fekk durafjórðingin, hevði tað sera stóran týdning hjá vágbingum ikki at tapa stórt, og tað sást á spælarunum, tá dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð, at javnleikurin hevði uppaftur meiri at siga enn eina stigið, sum teir fingu burturúr hesa ferð.

Tá TB og Skála fóru á vøllin á Sevmýri, vistu tey, at fjarstøðan upp til áttanda plássið fór at verða økt – í hvussu so er hjá øðrum liðnum. Javnleikurin ber við sær, at áttanda plássið fór tvey stig burtur bæði hjá TB og Skála, sum framvegis eigur fyrsta sigurin á. Um hann verður vunnin undan summarsteðginum valdast úrslitini í teimum báðum heimadystunum. Annað mikukvøld skal B68 spæla á Skála, og annan sunnudag fær Skála vitjan av KÍ.

Upphitingin til botnstríðið var merkisverd. TB royndi so leingi, sum tað bar til, at halda loyniligt, at Óli Johannesen skuldi spæla við teimum, og skálamenn stríddust í sínum lagi at fáa teir tríggjar úr Rumenia at hjálpa sær. Stóru trupulleikarnar høvdu teir loyst, men teir á Skála høvdu sambært FSF ikki lisið síðu 94 í kappingarskipanini nóg væl, og fótfeilirnir kostaðu trífalda styrkin. Um tað eisini kostaði sigurin á Tvøroyri og harvið kanska plássið í bestu deildini ber ikki til at siga.



KÍ-VB 3-1 (1-1):

# KÍ vann í jøvnum dysti



*Vágbingar spældi betri, enn teir hava gjørt flestu dystirnar í ár, men tað hjálpti lítið í Klaksvík, har heimaliðið fekk øll trý stigini*

*Mynd: SáH*

**Skuldi VB ikki detta heilt burtur ímillum í botninum, so skuldi trý stig til í Klaksvík leygardagin. KÍ kundi hinvegin við einum sigri, blanda seg í toppin í 2 deild**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Og tað var KÍ sum legði bragdliga fyri. Longu í fyrsta álopinum kundu teir skora, tá Erling Fles var einsamallur við málmanninum. Eftir 4 minuttir fær sami Erling ein møguleika aftrat, tá hann sleppur leysur í vinstru síðu, dregur inn í brotsteigin, og hesuferð skorar hann trygt.

Vágbingar fullu tó ikki í fátt av hesum skjóta málinum, men royndu heldur at koma longur fram á vøllin. Tað gingu ikki meir enn tríggir minuttir so hevði VB javnað. Kári í Lágabø fær bóltin úti í høgru síðu, fer framvið einum manni og komin inn í brotsteigin, smekkar hann til og bólturin fer í mál, uttan møguleika hjá John William í KÍ-málinum.

## Gekk javnt á

Næstu løtuna gekk toluliga javnt á, hóast KÍ hevði bóltin mest. Vágbingar vóru tó alla tíðina vandamiklir í mótálopunum. Sum fyrri hálvleikur leið tóku vágbingar meir og meir yvir, og burdi kanska fingið okkurt málið fyri hálvleik, men tað hendi ikki og tískil var hálvleikstøðan 1-1.

Sum VB hevði spælt í fyrra hálvleiki, mundu teir helst hava vónir um at okkurt fór at fáast burtur úr dystinum.

Seinni hálvleikur gekk eisini javnt á. Næsta málið kom tá okkurt um 20 minuttir vóru farnir. Ein bóltur verður sendur innfyri VB-málið, og har berjast ein KÍ-ari og ein VB-ari um bóltin. Endin er at bólturin verður skallaður á hondina á VB-verjuleikaranum, og dómarin bríkslaði fyri brotspark.

## Føldu seg snýttar

Vágbingar vóru alt annað enn nøgdir við henda dómin og føldu seg snýttar, serliga tá ein VB-ari beint frammanundan varð feldur í KÍ-brotsteiginum. Tað meinti dómarin tó ikki.

Olgar Danielsen tók brotsparkið, og sendi málmannin til skeiva síðu, og so var 2-1 til KÍ.

Nú sendi VB alt fólkið fram, fyri at fáa eitt og helst tvey mál. Teir komu eisini fram til góðar møguleikar, millum annað hevði Birgir Jørgensen, sum hesuferð var á næstbesta liðnum, tveir góðar møguleikar sum kundu givið mál.

VB fekk tó onki burturúr royndunum, og í staðin kundi KÍ í einum mótálopi skora seinasta málið í dystinum. Tað var innskifti Meinhard Hansen sum fekk hetta.

KÍ fekk sostatt 3 stig í einum jøvnum dysti, og eru teir við í oddinum í 2. deild. VB kundi ikki brúka úrslitið til nakað sum helst, men innsatsurin eigur at geva vón um okkurt stig áðrenn summarfrítíðina, nú tveir heimadystir móti B71 og B36 eru eftir.

**Dysturin í tølum:**
**KÍ-VB 3-1(1-1)**
1-0: Erling Fles
1-1: Kári í Lágabø
2-1: Olgar Danielsen br.
3-1: Meinard Hansen

# B68 misti møguleikan í síðstu løtu

**Enn eina ferð fingu toftamenn tvey brotsspørk ímóti sær, og nú hava teir ongan møguleika at halda fram í Europa**

INTERTOTO CUP
*Jóannes Hansen*

B68 fer leygardagin at royna at fáa eitt betri úrslit enn tað, sum teir megnaðu í Sveis leygardagin. Møguleikin fyri at halda fram í Intertoto kappingini er burtur, tí B68 tapti 5–1 í St. Gallen.

Jann Ingi Petersen minkaði um munin til 3–1, tá seinna umfarið var hálvrunnið. Marlon Jorge legði innfyri úr høgru, bólturin varð sendur út frá, og á brotsteigarmarkinum smekkaði unglingaspælarin til, og tað sang í netinum aftanfyri Oliver Stöckli.

Um B68 hevði megnað at hildið tørn um 3–1, so hevði møguleikin verið leygardagin at spælt seg víðari til næsta umfarið, tá St. Gallen leygardagin skal spæla á Svangaskarði. Men B68 megnaði ikki at halda tørn. Tá tað restaðu tríggir minuttir av vanligu leiktíðini fekk St. Gallen brotsspark, sum varð umsett til mál, og tá tríggir minuttir vóru farnir av tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, øktu teir til 5–1.

Longu eftir fimm minuttir kom heimaliðið á odda, og teir fimm túsund áskoðararnir í góðveðrinum vóru í góðum hýri, tá tað fimm minuttir undan hvíldini gjørdist 2–0. Eisini tað málið varð skorað upp á brotsspark.

Stóri málskjúttin hjá sveisiska liðnum var brasiliumaðurin Alex Jefferson, sum skoraði trý mál.

Toftamenn ásanna, at mótstøðuliðið var væl betri. B68 var sera verjukent í útgangsstøðuni. Barar Marcello Marcellino var á toppinum. Ætlanin var so, at Øssur Hansen og Arnold Joensen skuldu stuðla honum, men B68 álopini vóru ikki so mong. Haraftur-ímóti eydnaðist tað sveisiska liðnum fleiri ferðir at spæla seg til møguleikar, og B68 málverjin hevði fleiri góðar bjargingar.

Í nógvum teimum seinastu dystunum hevur B68 fingið brotsspark ímóti sær. Hesa ferð fekk mótstøðuliðið tvey brotsspørk. Dómarin var úr Albania, og av Toftum verður sagt, at tað var einki at tosa um, at talan var um heimadómara. Í fyrra førinum varð Messias lagdur undir at gera brotsspark, og í seinna førinum var tað John Heri Dam. Báðir kendu seg órtættvíst dømdar. Serliga John Heri Dam, sum royndi at sparka bóltin burtur, meðan ein maður hekk uppi í honum. Maðurin datt, og dómarin bríkslaði fyri brotssparki.

## Størri sigur

Tað er neyvan nøkur troyst fyri B68. Men FC Zürich úr Sveis vann størri sigur á einm liði úr Bosnia–Hersegovina, enn St. Gallen vann á B68.

NK Brotnja legði á útivølli í Zürich rygg til 7–0 tap. Eisini í tí dystinum var tað ein fremmandur maður, sum skoraði flestu málini. Kanga Akale av Fílabeinsstrondini var europeiskur toppskjútti leygardagin, tí hann skoraði fýra mál ímóti bosniska liðnum.

## INTERTOTO

**St. Gallen–B68 5–1 (2–0)**
Í St. Gallen leygardagin 22. juni kl. 18.00
Dómaratrio úr Albania: Sokol Jareci, Sokol Avdo og Engjell Pjetrushi.
UEFA eygleiðari úr Ungarn: Miklos Nagy.
5000 áskoðarar
1–0: Alex Jefferson 5.
2–0: Alex Jefferson br 40
3–0: Teresino Gane Ionel 63
3–1: Jann Ingi Petersen 67.
4–1: Alex Jefferson br 87.
5–1: Daniel Imhof 90.
FC St. Gallen: 1. Oliver Stöckli – 3. Carlos Walter Chaile, 4. Stefan Wolf, 5. Patrick Winkler, 6. Sascha Müller, 8. Daniel Imhof, 10. Inoel-Teresino Gane, 11. Alexander Tachie-Mensah, 15. Pascal Jenny, 19. Nicola Colacino, 21. Ivan Dal Santo
Á beinkinum (teir skiftu tríggjar út, men tað eydnaðist ikki B68 at fáa avrit av dómaraseðlinum): 18. Agosti Flavio, 7. Jerren Nixon, 9. Rainer Bieli, 16. Jan Berger, 17. Tranquillo, 20. Jario Luiz Filho, 22. Oscar-Fernando Tato
Venjari: Gérard Castella
B68: 1. Michal Kokoszanek – 5. Marlon Jorge, 10. Fróði Benjaminsen, 17. Messias Perreira, 6. John Heri Dam – 11. Arnold Joensen, 3. Fríðin Ziskason, 2. Jann Ingi Petersen, 18. Oleif Joensen (12. Jan Petersen, 61.), 7. Øssur Hansen, liðformaður – 9. Marcello Marcellino
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 4. Hans Fróði Hansen, 15. Mannbjørn Nesá, 16. Kjartan Nesá, 19. Gestur Lómstein
Venjari: Frank Skytte

# Taptu tepurt

**Føroyska manslandsliðið í hondbólti tapti við einum máli fyri íslendska U-21 landsliðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Føroyska manslandsliðið í hondbólti er í hesum døgum á venjingarlegu í Íslandi.

Sunnudagin spældu teir fyrsta av trimum dystum á ferðini, og var hesin móti íslendska U-21 landsliðnum. Hóast talan var um U-21 landslið, so var lítil ivi um, at føroyingarnir fóru at fáa harða mótstøðu. Íslendska liðið var herfyri í hálvfinaluni í HM, har teir taptu við einum máli fyri Russlandi.

Føroyska liðið var eisini nakað skert undan dystinum. Áki Olsen og Halgir Dahl Olsen hava báðir drigist við skaða, og eru einamest við í Íslandi fyri at fáa viðgerð fyri hesar, og hartil hevur Hans Áki Dal-Christiansen eisini fingið ein snudd, sum helt honum uttanfyri.

Kortini megnaði føroyska liðið fyri tað mesta at spæla fult upp við mótstøðuna. Allan fyrra hálvleiki gekk javnt á, og tó at tað dragnaði nakað fyrst í seinna hálvleiki, so komu okkara afturíaftur, soleiðis at mununrin at enda varð so tepur, sum tilber.

Hjalmar Klein Olsen, hjálparvenjari hjá føroyska liðnum, segði eftir dystin, at sum heild vóru hann og landsliðsvenjarin, Lars Nedergaard, hampuliga væl nøgdir um føroyska avrikið.

- Hetta er eitt gott mótstøðulið, og við skaðunum máttu vit eisini gera nakrar broytingar í verjuspælinum, so alt í alt haldi eg, at vit kunnu vera nøgdir.

Føroysku málini í dystinum sunnudagin skutu: Heini Joensen, 8, Ingi Olsen, 5, Bjarni Wardum 5, Sámal Joensen 4, Høgni Klein 2, Martin Hummeland, 2, Kristian Madsen, 1, John Zachariasen, 1

Týskvøldið spælir landsliðið aftur móti íslendska U-21 liðnum, og hóskvøldið verður dystur móti Íslendska U-19 landsliðnum.